# Mentamálaráðið

**Lógartænastan**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 22. mai 2018 |
| Mál nr.: | Skrivið her |
| Málsviðgjørt: | FP/JN/JP |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

## Kunngerð
## um
## Útbúgvingarráð fyri heilsuhjálparaútbúgvingina og heilsurøktaraútbúgvingina og útbúgvingarráð fyri námsfrøðiligu hjálparaútbúgvingina

Við heimild í § 26, stk. 4 og § 27, stk. 4 í løgtingslóg nr. 42 frá 26. apríl 2019 um heilsuhjálparaútbúgving, heilsurøktaraútbúgving og námsfrøðiliga hjálparaútbúgving verður ásett:

**§ 1.** Fyri støðugt at menna heilsuhjálparaútbúgvingarnar, heilsurøktaraútbúgvingarnar og námsfrøðiligu hjálparaútbúgvingarnar setir landsstýrismaðurin ávikavíst útbúgvingarráð fyri heilsuútbúgvingarnar og útbúgvingarráð fyri námsfrøðiligu hjálparaútbúgvingina.
*Stk. 2.* Útbúgvingarráðini hava til endamáls at fylgja gongdini innan útbúgvingarnar og viðgera uppskot um at broyta og endurnýggja tær.
*Stk. 3.* Útbúgvingarráðini skulu ummæla námsskipan skúlans, námsætlanir fyri lærugreinirnar, innihaldið annars í útbúgvingunum, umframt viðgera viðkomandi mál, sum hava týdning fyri útbúgvingarnar.
*Stk. 4.* Ráðini kunnu heita á serkøn fólk at vera sær til hjálpar í arbeiðnum at menna útbúgvingarnar.

**§ 2.** Útbúgvingarráðini fyri heilsuútbúgvingarnar og námsfrøðiligu hjálparaútbúgvingina hava 7 limir og 7 tiltakslimir hvør, sum landsstýrismaðurin tilnevnir fyri eitt 4 ára skeið í senn eftir tilmæli frá stovnum og pørtum, nevndir í stk. 2 og 3.
*Stk. 2.* Útbúgvingarráðið fyri heilsuútbúgvingarnar verður tilmælt soleiðis:
1) Almannaverkið gevur landsstýrismanninum tilmæli um val av einum limi og einum tiltakslimi.
2) Heilsu- og innlendismálaráðið gevur landsstýrismanninum tilmæli um val av einum limi og einum tiltakslimi.
3) Kommunufelagið gevur landsstýrimanninum tilmæli um val av einum limi og einum tiltakslimi.

4) Heilsuhjálparafelag Føroya gevur landsstýrismanninum tilmæli um val av einum limi og einum tiltakslimi
5) Heilsurøktarafelagið gevur landsstýrismanninum tilmæli um val av einum limi og einum tiltakslimi.
6) Lærararnir í Heilsuskúla Føroya geva landsstýrismanninum tilmæli um val av einum limi og einum tiltakslimi millum lærarar skúlans.

*Stk. 3.* Útbúgvingarráðið fyri námsfrøðiligu hjálparaútbúgvingina verður tilmælt soleiðis:

1) Almannaverkið gevur landsstýrismanninum tilmæli um val av einum limi og einum tiltakslimi.
2) Kommunufelagið gevur landsstýrimanninum tilmæli um val av einum limi og einum tiltakslimi.
3) Námsvísindadeildin á Fróðskaparsetri Føroya gevur landsstýrismanninum tilmæli um val av einum limi og einum tiltakslimi.
4) Føroya Pedagogfelag gevur landsstýrismanninum tilmæli um val av einum limi og einum tiltakslimi.
5) Hjálparfólkafelagið gevur landsstýrismanninum tilmæli um val av einum limi og einum tiltakslimi.
6) Lærararnir í Heilsuskúla Føroya geva landsstýrismanninum tilmæli um val av einum limi og einum tiltakslimi millum lærarar skúlans.

*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin tilnevnir ein lim til hvørt útbúgvingarráð, sum er formaður, umframt tiltakslim hansara.
*Stk. 5.* Um limur í útbúgvingarráðnum tekur seg úr ráðnum, tekur tiltakslimurin við, og viðkomandi felag ella partur, sum limurin hevur umboðað, sendir Mentamálaráðnum tilmæli um val av nýggjum tiltakslimi.
*Stk. 6.* Leiðarin fyri Heilsuskúla Føroya er skrivari í útbúgvingarráðnum, men hevur ikki atkvøðurætt.
*Stk. 7.* Umboð fyri Mentamálaráðið umframt leiðarin fyri sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingina kunnu taka lut á útbúgvingarráðsfundunum eftir áheitan frá ráðnum.

**§ 3.** Formaður útbúgvingarráðsins boðar til fundar eftir tørvi, tó skulu í minsta lagi 2 fundir vera um árið.
*Stk. 2.* Formaðurin ásetir fundartíð og fundarstað.
*Stk. 3.* Formaðurin ger fundarskrá, sum saman við møguligum skjølum verður send ráðslimunum í seinasta lagi 7 dagar undan fundinum. Formaðurin kann í serligum førum víkja frá tíðarfreistini.
*Stk. 4.* 3 ráðslimir kunnu skrivliga krevja fund um ítøkilig evni. Formaðurin boðar í hesum føri til fundar í seinasta lagi 14 dagar eftir, at áheitanin er formanninum í hendi.

**§ 4.** Útbúgvingarráðið er viðtøkufø rt, tá ið í minsta lagi 4 ráðslimir eru á fundi.

**§ 5.** Gerðabók verður førd á útbúgvingarráðsfundunum, og fundarfrásøgn verður send ráðslimunum í seinasta lagi 14 dagar eftir fundin.

**§ 6.** Skrivstova útbúgvingarráðsins er í Heilsuskúla Føroya.

**§ 7.** Heilsuskúli Føroya rindar fundarsamsýning og ferðaútreiðslur hjá limunum í útbúgvingarráðnum sambært reglum hjá Fíggjarmálaráðnum.

**§ 8.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Samstundis fer kunngerð nr. 87 frá 31. mai 2017 um útbúgvingarráð fyri heilsuhjálparaútbúgvingar og heilsurøktaraútbúgvingar úr gildi, tó soleiðis, at sitandi útbúgvingarráð fyri heilsuútbúgvingarnar heldur fram við virksemi sínum, til nýtt útbúgvingarráð verður tilnevnt.

Mentamálaráðið, 24. mai 2019

**Hanna Jensen**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen